Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Henrik Old, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Príshækkingar í SEV

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at tvinga húsarhaldini at gjalda fyri streym, sum tey ikki fáa nyttu av?
2. Ætlar landsstýrið at veita endurgjald til SEV fyri streym, sum húsarhaldini ikki fáa nyttu av og samtíðis fyri at sleppa undan príshækkingum?

Viðmerkingar:
Í øllum Norðurlondum og í pørtum av Europa hevur tað seinastu tíðina verið boðað frá stórum príshækkingum á streymi til húsarhaldini. So nógv, at í onkrum londum hevur verið upp á tal at veita stuðul til húsarhaldini fyri at byrgja upp fyri stóra vøkstrinum í streymprísinum. Samtíðis frættust tey gleðiligu tíðindini her heima, at SEV ikki hevði ætlanir um at hækka streymprísin í 2022.

Men mánakvøldið kom fram, at nýggjar vindmyllur eru á veg, sum fara at kosta SEV á leið 60 milliónir kr. tey næstu 3-4 árini. SEV kann bara brúka 20% av orkuni frá vindmyllulundunum, men er tvingað til at keypa streymin. SEV verður tvingað at senda rokningina víðari til húsarhaldini, sum eru tey einastu, sum kunnu gjalda fyri streymin, tey ikki fáa nyttu av. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 23. november 2021

Henrik Old